# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Sangøta í Vestmanna kirkju



**Sunnudagin 5. nov. kl. 19.00, sum er Alla halgana sunnudagur, skipar Vestmanna Kirkjukór fyri sangløtu í Vestmanna kirkju**

TÍÐINDASKRIV

Á skránni verður kórsangur solusangur og felagsangur við luttøku av Paula Magna Magnussen & co, Kirstin Johannesen og Bárða Kjærbæk, øll úr Vestmanna. Gestasangarar verða Kollfirðingurin Jens Marni Hansen, og Hannis Hansen úr Fuglafirði.

Presturin Inga Poulsen Dam kemur at siga nøkur.

Aftaná sangin í sjálvari kirkjuni er hugnaløta í kirkjukjallaranum.

Tiltakið er heilt ókeypis, men fólk kunnu eins og seinast lata eitt oyra til Vestmanna Kirkjukór.

Øll eru vælkomin.

Dánial Christoffersen:

## 25 ára starvsdag hjá HDYGD

Dánial Christoffersen í Sandavági hevði 25 ára starvsdag hjá HDYGD mikudagin 1. november 2006. Hann byrjaði sum skrivstovulærlingur og hevði Hans Jacob Joensen sum lærumeistara.

Í dag starvast Dánial sum bókhaldari hjá HDYGD – ella rættari hjá feløgunum báðum, sum nýta navnið HDYGD, tað eru Vatnsoyra Snikkaravirki og Føroya Gluggi.

Feløgini hava felags sølu og fyrisiting og marknaðarføra seg undir navninum HDYGD.

Í sambandi við dagin, var lítil hugnaløta fyri øllum starvsfólkunum, har Dánial fekk handaðan málning frá leiðsluni. Málningurin, sum Pól Skarðenni hevur málað, er av heimbygdini Sandavági, sum Dánial er so stoltur av. Hann er eisini í bygdarráðnum, har hann situr á fjórða skeiði.



*Mikudagin 1. november 2006 hevði Dánial Christoffersen (v.m.) í Sandavági 25 ára starvsdag hjá HDYGD. Her handar Heðin Poulsen, sølu- og fyrisitingarleiðari, honum ein málning frá leiðsluni*

**Føðingardagur**
Av serligum grundum er føðingardagurin hjá Halgerð Andreasen fluttur til Eyðun Andreasen, Millum Svalir 12, leygardagin 4. nov. frá kl 17.00 til 19.00

**Brúdleyp**
Fríggjakvøldið 3. november 2006 giftast Barbara Steinkross, Tvøroyri, og Sámal Joensen, Tórshavn. Vígsla og veitsla verða fyri innbodnum á Gjáargarði.

**Gullbrúdleyp**
Høvi verður at heilsa uppá gullbrúðarparið Marjun og Símun Jóhan Wolles í Mizpa á Eiði leygardagin 4. nov. millum kl. 14 og 19

## Teledepilin nýggja fasadu




*Bygningurin hjá P/F Ingibjørg Dam, har Teledepilin heldur til í N. Finsensgøtu, verður í løtuni umbygdur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Bygningurin, har Telebúðin heldur til í N. Finsensgøtu, verður í løtuni umbygdur.

Bygningurin verður framvegis í trimum hæddum, og eftir ætlan verður ovasta hæddin leigað út til skrivstovur.

Í staðin fyri mønutak fær bygningurin nú slætt tak, og báðar tær ovaru hæddirnar fáa ein útbygning út móti gongugøtuni. Eftir útbygginina verður bygningurin nakrar fermetrar størri. Umbyggingin verður eftir ætlan liðug í vár.

Tað er P/F Ingibjørg Dam, sum eigur bygningin. Ingibjørg er dóttir Thomas Dam, sum átti bygningin í nógv ár. Nú eigur hon bygningin saman við døtrunum.

Sosialurin -har tað hendir